gult cyan magenta svart



## Fremmanda Gentan



SJÓNLEIKUR

Í vikuskiftinum 3. og 4. febr. verður sjónleikurin Fremmanda Gentan framførdur á Dramaverkstaðnum á Nabb.

Sjónleikurin er um eina smágentu sum er flóttafólk í Føroyum.

Hetta er ein stuttur barnaleikur, sum tey 10 og 11 ára gomlu børnini dramaverkstaðnum leika. Børnini byrjaðu at venja í november 2000, og øll uttan 2 eru nýbyrjarar. Leygardagin er ein sýning kl 18 og sunnudagin eru tvær sýningar kl. 16 og kl. 18. Atgongumerkir kunnu keypast í forsølu í Kunningarstovuni og á Dramaverkstaðnum 1 tíma undan sýning.

Børn undir 5 ár skulu vera saman við vaksnum, sigur Dramaverkstaðið í tíðindaskrivi.

## Lindin víðkar virksemið

ÚTVARPSSTØÐ

*Eirikur Lindenskov*

Nú um dagarnar er eitt ár liðið, síðani útvarpsstøðin Lindin, ið sendir kristiligt tilfar, sendi fyri fyrstu ferð.

Í hesum sambandi skipar útvarpsstøðin fyri tíðindafundi í dag, har fjølmiðlarnir verða bodnir til morgunbreyð og kaffi.

Tey, ið standa aftan fyri útvarpsstøðina Lindina, fara at greiða fjølmiðunum frá virkseminum farna árið, um aktuellu víðkanina í morgin, um nýggjar sendingar og senditíðir og framtíðarætlanum annars.

VIÐMERKING

# Ráðagerðin móti Suðuroynni

**Rúni Tummasarson**
*Tvøroyri*

Tað vóru feigdarboð í Útvarp Føroya hevði at bera suðringum afturvið náttúrðanum mánakvøldið tann 8. jan. Mangur bitin ið var ætlaður at metta og skapa vælvild nú dagurin gekk at halla, man hava kúvent í maganum og leitað sær uppaftur í ljósið, nú henda beistagerð norðan úr høvuðsstaðnum varð almannakunngjørd í teimum føroysku stovunum.

Hálmstráið, sum suðringar seinastu árini hava krøkt seg í, og sum hevur givið einastu vónina um ein glotta fyri vinnulívið, eins væl sum fyri trivnaðin sum heild í oynni, varð kvett við einum deyðiligum banahøggi.

Fyri teir mest svartskygdu suðringarnir vóru boðini bert ein staðfesting av tí, sum teir søgdu seg vita var í væntu. Tá ið løgtingið í februar mánaða í fjør avgjørdi at lata marknaðarkreftirnar sjálvar finna útav, hvar ein útgerðarhavn fyri oljuvinnuna skuldi liggja, var avgerðin í veruleikanum longu tikin. Tí marknaðarkreftirnar eru sjálvsagt sterkast har vinnulívið er sterkast, og tað er ikki í Suðuroynni. Hetta veit hvørt mannsbarn. Tað sum eisini átti at verið eyðsýnt, í øllum førum fyri landsins kosnu menn, er at tá ið ein letur marknaðarkreftirnar ráða, og letur tær sjálvar taka slíkar avgerðir, so er tað ikki vist at hendan avgerðin er tann besta fyri samfelagið sum heild. Eisini er tað púra greitt, at hesir somu menn eru ikki áhugaðir í, at hendan avgerðin verður grundað á kappingarføri, í orðsins besta týdningi.

Hetta at lata marknaðarkreftirnar ráða, er bert eitt skálkaskjól fyri polititikkarnar.À henda hátt sleppa teir undan at taka nakrar illa dámdar avgerðir, nú val stendur fyri durum. Við øðrum orðum gera teir ikki tað teir eru valdir til at gera. Um hetta var í tí privatu vinnuni, sum hesir somu menn siga seg verja, so vóru teir uppsagdir og tað stundisliga. Havast skal í huga, at tað eru ikki bert politikkararnir sum í hesum føri hava ávirkan, men tað eru eisini aðrir persónar sum kunna taka avgerðir av týdningi í hesum málið. Hetta eru ikki persónar ið fólkið hevur valt, men hesir nýta høvið at fjala seg aftanfyri tað leysu orðingina, sum teir folkavaldu settu í oljulóggávuna.

Nú er tað so endiliga komið fram, at einasta VIRKSEMI sum suðringar fara at fáa burturúr, hesa fyri okkum øll nýggju vinnu, verður ein partur av tilbúgvingini t.v.s. goymsla av nøkrum oljuforðingum.

Hetta kann uttan iva goymast í nøkrum fáum bingjum, so at kalla hetta VIRKSEMI, er at halda fólk fyri tað turra spott. Um landsins kosnu menn, meta hetta at vera VIRKSEMI í orðsins røttu týðing, so er tað ikki torført at ímynda sær, hvussu nógv VIRKSEMI fer fram í teim mongu stýrunum í høvuðstaðnum.

Sum vera man so kunnu persónar ávirkast. Ì einari kapping ber til at trýsta, og taka aðrar heldur ódámligar hættir í nýtslu, við tí fyri eyga at fáa mótpartin vístan úr kappingini, áðrenn tað gerst alt ov sjónligt, hvør veruligi vinnarin er. Um slíkir hættir hava gjørt seg galdandi, tá ið talan er um útgerðarhavnina, dugi eg ikki at meta um, men tað er ongin loyna, at soleiðis halda flestu suðringar, at leikur er farin fram.

Kann tað hugsast, at í einari rættvísari kapping um útgerðarhavnina, hevði Norserv verið sjálvsagdi vinnarin?

Kann tad hugsast, at um Norserv fekk møguleikan at bjóða seg fram á jøvnum føti við Asco, Eimskip og Atlantic Supply Base, so hevði felagið verið ført fyri at veitt tænasturnar fyri lægri kostnað enn feløgini norðanfjørðs?

Sum støðan er fæst ongantíð greiða á hesum, men eitt er tó púra greitt, tað er ikki kvalifikatiónunum hjá Norserv ið nakað er galið við. Móðurfelagið hjá hesum felag serviserar frammanundan fyritøkur sum SHELL, CHEVRON, TEXACO og AMERADA HESS. Alt fyritøkur ið eru væl størri enn STATOIL .

"Økismenning og útjaðarapolitikkur". Hetta eru føgur orð ið mangan hava verið at hoyrt seinnu árini, serliga frá poltikkarunum. Tey eru mestsum burturav nýtt at sissa onkran við, sum ikki hoyrir heima í miðstaðarøkinum, og sum hevur dittað sær at funnist at politikkarunum. Í dag kunnu vit bert staðfesta, at hesi orð eru útholaði og onga meining hava í veruleikanum.

Nú eru bert eini ráð til at taka. Tað er at lata sitandi samgongu merkja fylgjurnar av teirra vantandi førleika at taka tær avgerðir ið eru teirra skylda. Hetta gerst best við, at allir suðringar møta fjølmentir á valinum 25. apríl 2001, tá ið vit væntandi skulu atkvøða um framtíðar støðu Føroya í ríkisfelagsskapinum. Her skulu vit vísa okkara ónøgd við at ganga ímóti samgonguni og fella teirra uppskot. Vónandi er løgmaður so mikið at sær komin, at hann skrivar út nýval eftir slíkan ósigur.

Best hevði verið um valfeløgini í suðri tóku seg saman, og í felag heittu á allar suðringar um at fella uppskotið hjá samgonguni.

Eitt dømi um hvussu lítið gott vit í Suðri hava í væntu frá hesu samgongu, er málið um tann nýggja Smiril. Her talar gongdin í málinum higartil fyri seg sjálvan. Men tað kemur neyvan óvart á nakran í Suðri, um játtanin til nýggja Smiril verður skerd áðrenn langt er fráliði. Hetta verður væl gjørt við tí grundgeving at nú ongin oljuvinna verður í Suðri kortini, so hava suðringar ikki betri samferðslu fyri neyðini. Onkur vil uttan iva halda, at vit í Suðri nú eru farin at síggja trøll á alljósum degi, men lat okkum nú síggja.

Tað gerst alt meiri vanligt, at hoyra suðringar tosa um, at loysa oynna frá restini av Føroyum. Hesar røddir gerast alt harðari og er hetta ikki í spølni, men í rámasta álvara. Politikkarnir í "konTórshavn" skulu ikki kenna seg vísan í at hetta krav kann tigast burtur. Kanska Suðuroyggin fær loysing áðrenn Føroyar. Vit eru í øllum førum samd um hvat skal standa á atkvøðuseðilinum.

Tíðindaskriv frá Almanna- og Heilsumálastýrinum

# Broytingar á pensjónsøkinum

Gjørt skal vera vart við, at við løgtingslógunum nr. 3 og 4 frá 25. jan. 2001 eru gjørdar nakrar broytingar á pensjónsøkinum, sum fáa gildi frá komandi útgjaldi.

Sjúkrakassaviðbótin (160 kr. / mðr.) er ikki longur at finna, sum ein sjálvstøðug viðbót, men er løgd inn aftur í vanligu viðbótina, sum er hækkað tilsvarandi.

Allar viðbøturnar er somuleiðis hækkaðar við 4%.

Annars eru reglurnar fyri barnaviðbótini broyttar soleiðis, at ein pensjónistur fær eina barnaviðbót pr. barn undir 18 ár, um so er, at barnið ikki uppiheldur sær uttanfyri heimið eftir forsorgar- ella barnaforsorgarlógini. Eru bæði foreldrini pensjónistar fáa tey eina viðbót í part, og ikki bert eina sum frammanundan.

Viðv. fólkapensjónini og lægstu fyritíðarpensjónini er annars einans talan um smærri broytingar í upphæddunum, og tí skuldu hesir bólkar ikki merkt nakran serligan mun í útgjaldinum.

Viðv. miðal og hægstu fyritíðarpensjón er viðbótin nú býtt sundur í eina viðbót og eina avlamisviðbót, harav tann seinna er skattafrí og ikki-inntøkuávirkað. Hetta merkir, at fyri flestu pensjónistarnar í hesum bólkunum skuldi talan gjørst um eina ávísa hækking í útgjaldinum.

Tann inntøkan, sum pensjónisturin kann hava umframt pensjónina, uttan at hetta ávirkar upphæddina er broytt til 21.400 kr. og 42.800 kr. fyri ávikavist fólka- og fýritíðarpensjónistar.

Eisini er avlamisveitingin innførd aftur fyri tey, sum læknaliga lúka treytirnar fyri at fáa hægstu ella miðal fyritíðarpensjón, men sum ikki kunnu fáa pensjón orsakað av ov høgari inntøku.

Tá talan er um fulla (óskerda) pensjón eru mánaðarligu upphæddirnar frammanundan skatti:

| | stakur: | giftur: | giftur ikki-penjónisti*: |
|---|---|---|---|
| Fólkapensjónistur: | 6.046 kr. | 4.678 kr. | 5.534 kr. |
| Hægsti fyritíðarpensjónistur: | 10.258 kr. | 9.000 kr. | 9.856 kr. |
| Miðal fyritíðarpensjónistur: | 7.459 kr. | 6.425 kr. | 7.281 kr. |
| Lægsti fyritíðarpensjónistur: | 5.439 kr. | 4.333 kr. | 5.189 kr. |

Viðv. bólkinum giftur ikki-pensjónisti er talan um persónar, sum innan 1. jan. 2000 fingu pensjón og longu tá vóru giftir einum ikki-pensjónisti.



# hygg & hoyr



**Frá fríggjadegi 2. februar til hósdagin 8. februar**

## Prix Føroyar - Strendur

&

svf Mikukvøld kl. 21.40 — ÚF Mánadag kl. 16.03




*Bæði Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya fara at senda frá Prix Føroyar kappingini, sum verður á Strondum um vikuskiftið.*

*Útvarpið fer at senda mánadagin kl. 16, meðan Prix Føroyar verður á skránni mikukvøldið kl. 21.40 í sjónvarpinum.*

*Bólkarnir, sum skulu á pallin leygarkvøldið, eru Flux, Epot, I am, No Connection, Marigold, Janus Trúgvason, Pínadoy, Phantoms og Side Effects. Bara Flux og I am vóru við í kappingini seinast, og tá eydnaðist tað Flux at koma í finaluna. Spennandi verður at frætta, hvørjir tveir bólkar fara víðari í finaluna.*

## Hvørjum skal eg....

*Dagfinn Olsen ummælir:*



Fyrr plagdu vit at skemta við altjóða gleivstrøðu og so framvegis. Kanska aktuelt í hesum døgum. Veit ikki, hvussu nógv hava givið sær far um tað, men fimleikaløtan í ÚF er burtur! Kanska onkur saknar hana. Hendan fasta tátt í eini 10 ár. Nyggja skráin er við at festa seg og við at vinna hevd. Broytingar eru ringar at framja, men tær vinna sum oftast og tað er oftast til tað betra. Morgun redaktiónin er eftir mínum tykki ófør og tað er heppið, at vit sleppa at hoyra tættirnar aftur á kvøldið. Saknur var í hesum, tá hetta ikki var.

Dagarnir eru framvegis heldur stuttir, so gott er at hava sjónvarp. Hesi orð falla ofta hesa myrku tíð. Men tá sagt verður sjónvarp, so verður neyvan altíð meint við stovnin, ið vit nevna Sjónvarp Føroya. Har tykist ofta langt millum góðu sendingarnar.

Og skal ein so til at meta Sjónvarpið, sum ein veruligan stovn og samanbera við aðrar mentanarstovnar í londunum kring okkum, so er langt á mál. Enn eru føroysku minuttirnir á sjónvarpsrútinum ikki so nógvir í tali. Telja vit so ikki tíðindasendingarnar við, so er sera lítið eftir. Tað er, sum fer øll orka til hesar sendingar og so má manningin bara gera hitt umframt. Skal ikki siga, at tað er so, men tað kann tykjast so.

Neyvan er lætt at eita Sjónvarp, tað er greitt, og øll tekin eru eisini um hetta.

Men glottar eru. Útvarp og sjónvarp eru við til at fyrireika Prix Føroyar og gera nógv burturúr. Loftmiðlarnir eiga rós fyri hetta tiltak, sum eisini FUT og Norðurlandahúsið fyrireika.

Útvarpið sendir beinleiðis frá leikstøðunum fríggjakvøld og leygarkvøld. Tað er frálíkt og lurtarin kann fylgja við so hvørt. Tikið verður so samanum mánadag.

Sjónvarpið spílar seg eisini út í samband við tiltakið. Johan Dalsgaard í Kollafirði gjørdi eftir mínum tykki rímuligar sendingar undanfarin prix-ár. Nú hevur Tróndur Vatnhamar hevur tikið yvir. Hann kenna tey, ið hoyrdu Atlantic Radio. Har stóð hann fyri lívligum útvarpstímum.

Sendingin í Svf mikukvøldið boðar frá góðan. Ein ungdómssending, eingin ivi um tað, men tó ikki soleiðis, at tey tilkomnu venda sær frá sjónvarpsrútinum. Nyggi verturin hevur eina aðra uppskrift, enn hana, vit hava sæð undanfarin ár. Tó er stílurin ikki so av leið frá undanfarnum sendingum, men tiltakið er jú tað sama.

Nýggja sendingin riggar væl og er í rætta stílinum. Ungdómlig.

Men annars hevur ikki nógv verið at koma eftir í Svf hesa vikuna. Tað er, sum at tað er líkamikið, um ein koyrir á føroysku rásina, ella onkra aðra. Tilfarið er tað sama og tað er útlendskt.

**Hvørjum skal eg…**

Tað besta, eg havi sæð í Svf nýliga, er lýsingin fyri Gekkin við arabiskum teknum. Hon er framúr og ein kann vóna, at slíkur kreativitetur breiðir seg til veruligu sendingarnar.

Nú er ummælarin kanska farin ov illa við Svf. Men Svf er ein stovnur, ið hevur verið í kreppu. Starvsfólkið á stovninum ger óivað sítt besta. Kanska skal politiski myndugleikin taka sær nær!?!

Men nú er aftur tíðin, har vit millum hvørja sending í Svf síggja svartar handskar banka á dyrnar hjá fólki. Sjónvarpsgjald!

Men hvat gjalda hyggjarar fyri? Eins og í Úf, so er alt vanligari í Svf við sponsorum. Einasta líkinda sendingin hesa vikuna, var stuðlað av Føroya Bjór!

Kanska skuldu hyggjarar spurt seg sjálvar: hvørjum skal eg siga takk… ?

### Basalt




### Kristitrúgv og kvæðayrking




### Prix Føroyar - av Strondum




### Bestubitar: Søga og spír 3:6

